# TILTØK

**Gudstænastur**
*Sunnudagin 6. februar*
*Føstuinngangur*
Havnar kirkja: Bjarni Bæk kl. 11.00
Vesturkirkjan: Heri Joensen kl. 11.00
Kirkjubøur: Bergur D. Joensen kl. 12.00
Nólsoy: Jóannis Fonsdal kl. 12.00
Haldarsvík: Marjun Bæk kl. 12.00
Skála: Jógvan Fríðriksson kl. 11.00, altargongd
Gøta: Martin R. Jacobsen kl. 12.00
*Í Nes prestagjaldi gongur talvan fyri Heimamissiónina*
Fuglafjørður: Uni Næs kl. 12.00, altargongd
Funningsfjørður: Uni Næs kl. 16.00
Klaksvíkar Sjúkrahús: Elsa Funding kl. 10.00
Norðoya Røktarheim: Elsa Funding kl. 14.30
Christianskirkjan: Niels P. Danielsen kl. 11.00, altargongd
Haraldsund: Hans Eiler Hammer kl. 12.00
Gásadalur: David Johannesen kl. 11.00, altargongd
Bøur: Inga Poulsen Dam kl. 12.00
Skopun: Jákup R. Hansen kl. 12.00
Sandvík: Ólavur Rasmussen kl. 18.00
Fámjin: Jónsvein Bech kl. 12.15
Hov: Patrick de Neergaard kl. 12.00
*Talvan gongur í Porkeris kirkju fyri Heimamissiónina*

*Føstugudstænastur mikukvøldið 9. februar*
Vesturkirkjan: Henrik Fossing kl. 20.00
Gjógv: Heri Joensen kl. 19.00
Funningur: Heri Joensen kl. 20.30
Norðskáli: Inga P. Dam kl. 19.00
Eiði: Inga P. Dam kl. 20.30

*Føstugudstænastur hóskvøldið 10. februar*
Sjóvar kirkja: Jógvan Fríðriksson kl. 20.00
Oyndarfjarðar kirkja: Bergur Debes Joensen kl. 20.00
Miðvágur: David Johannesen kl. 19.00

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 verður morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30 verður samvera við drekkamunni. Kl. 12 verður sunnudagsskúli og kl. 12 verður eisini møti, har Rodmundur í Liða talar.
www.hebron.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheiminum, Marknagilsv. 75.*
Møti sunnumorgun kl. 10.30. Breyðbróting. Barnaansing verður eisini. Mánakvøld kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Lívdin**
*Í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 er evnið "Góðir vanar í arbeiði", talari Jákup Jacobsen. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Zachariassen um evnið "Máttur Guds". Barnaansing er undir báðum møtinum. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur millum møtini.
www.livdin.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli á Norðrasta Horni. Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Martin Thomsen.

**Frelsunarherurin**
*Tórsgøta 19*
Sunnudagin kl. 11.00: Møti. Palli Petersen talar.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 17.30: Bøn.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti, har Ragnar Ludvig talar. Nógvur sangur og vitnisburður.
Øll eru vælkomin.

**Frá Ebenezer**
Fríggjadag
kl. 20.00 Teen-Night
Sunnudag
kl. 10.00 Breyðbróting.
kl. 12.00 Sunnudagsskúli
kl. 20.00 Sangmøti í Ítróttarhøllini á Hálsi
Yngra kvartettin úr Betesda skipar fyri
Øll eru vælkomin
Mánadag
kl. 17.00 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi
Øll eru vælkomin
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*Uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl 11.00: Guðstænasta v/ Jóhan P. Johannesen, evni: lærarar, kl 14.00: Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl 20.00: Felags bønamøti í Filadelfia.
Mikumorgun kl 07.00: Bøn.
www.oasan.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta kvinnur.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli.
kl. 18.00 Møti v. Martin Dam, Akapella syngur.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30: Messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00: Hámessa við Torsten Jortzick, prestur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Heimasíða: www.katolsk.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Leygarkvøldið kl. 20.00 í KFUM: Ungdómsmøti. Bergur Debes Joensen prestur er við.
Mánadagin kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman við Guttormi Zachariasen.
Týsdagin kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børn. Vit sláa tunnu.
Týskvøldið kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga Sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17.00: Landsbøn
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Ólavi Jacobsen.
kl.11.50 sunnudagsskúli og ABC. Evni: "Hjúnabandið" 2., kl. 18.00: Møti v/ Steintór Hjaltalin og Torbjørn Láadal
Mánadagin kl. 20.00: Felagsbønarmøti í Filadelfia
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067
www.filadelfia.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Nazaret, Kaldbak**
John í Skemmuni úr Porkeri og aðrir tala á møtinum fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 17. Ólavur á Váli og onnur luttaka við sangi.

**Frá Zion í Kollafirði**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20.00. Drekkamuður verður aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kollafjarðar missiónshús**
Leygarkvøldið kl. 20.00: Leo Hans Mikkelsen. Sørvágskórið syngur.
Sunnudagin kl. 14.30: Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti við Regin Høgnesen. Miktam syngur.

**Saron Vestmanna**
Sunnudagin verður evangeliskt møti klokkan 18.00.
Mánakvøldið opið hús fyri ung klokkan 20.00.
Veri hjartaliga vælkomin.

**Aglow Vágar**
Møti verður leygardagin 5. febr. kl. 9.30 við drama og vitnisburði í Missiónshúsinum Libanon. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagsskúli verður kl. 14.30 sunnudagin.
Møti kl. 18 við Lovindu og Tórgun.
Hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl.13.30 sunnudagsskúli og kl 19.00 møtið við Reimund Langgard evin: Náðigávur, innsamling til húsið. Eftir møtið drekka og hugnalig samvera.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin sunnudagsskúli kl. 14.00. Møti kl. 18.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Elim, Søldarfjørður**
Møti sunnukvøldið kl. 18.00. Talarar: Joen Magnus Rasmussen og Justinus Eliassen, Leirvík.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sjómanskvinnuringarnir í Runavík og Søldarfirði**
koma saman í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum mánakvøldið kl. 19.30. Torleif, Simony og Amaliel Knudsen verða við. Innsavnan.
Allar kvinnur vælkomnar.

**Keldan í Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00: Awake við Rúna Rasmussen.
Sunnudagin kl. 17.00: Møti v/ Paula Høj. Trio úr Kollafirði syngur. Barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum leygarkvøldið kl. 20 við Kajberg Davidsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Lívsins Orð Saltangará**
Sunnudagin kl. 17.00: Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin. Hjúnabandsseminarið verður í viku 6. Møguleiki er fyri at tekna seg til hetta, hesa vikuna á tlf. 448342.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Einki møti verður sunnukvøldið, víst verður til Missiónsvikuna í Fuglafirði.
Ungdómsmøti kl. 21.00 við Boga Olsen.
Øll eru vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Missiónsvikan heldur fram.
Leygarmorgunin kl. 9.30: Morgunbreyð. Bíbliutími v/ Jóannis Fonsdal. Evni: »Tit skulu elska hvør annan – eins og eg havi elskað tykkum«.
Kl. 19.00: Møti. Talari verður Torleif Johannesen. Sangur: Nýggjur sangbólkur úr Thabor.
Kl. 22.00: Ungdómsmøti. Talari verður Reimund Langgaard. Sangur: Bjartur Johannesen. Lovsangs- og vitniløta.
Sunnudagin kl. 12.00: Gudstænasta við altargongd. Uni Næs prædikar.
Kl. 15.00: Sunnudagsskúli.
Kl. 18.00: Møti. Talari verður Torleif Johannesen. Sangur: Thaborkórið.
Innsavnan til Heimamissiónina.

**Missónshúsið á Viðareiði**
Leygarkvøldið 05-02 kl.21.00 verður ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K Klaksvík**
Sunnudagin kl.14.00: Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 bønarløta. Kl. 18.00 møti við Óli Marner Christiansen. Kl. 21.00 ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin
www.kuff

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl.13.30 er sunnudagsskúli og kl.18.00 er møti.
Tú ert hjartaliga vælkomin!

**Missiónshúsið í Skopun**
Leygarkvøldið kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Sunnudagin
Kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Kl. 17.30: Bøn- & lovsangsløta.
Kl. 18.00: Møti.
Mánakvøldið kl. 19.00 kemur ungdómurin saman frá 7. fl. og eldri.
Missiónsvikan verður í døgunum 17.-20. februar.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Hjartaliga vælkomin.

**Betania í Skopun**
Møtirøðin í Betania við Viggo Wilhelmsen heldur fram leygarkvøldið kl. 20.00. Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti. Sunnudagin kl. 20.00: Kvøldmøti.
Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti við Jónsvein Bech og Ednu Bech. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møtið. Missiónsvikan byrjar mikukvøldið 9. febr. við gudstænastu kl. 20.00 við Mogens Tilsted Christensen.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin í Vági**
Sunnudagin 6. febr. kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Sunnudagin kl. 17.30: Bønarmøti.
Møti við luttøku av oberstlt. Inger og Einar Høyland úr Noregi verður sunnudagin kl. 18.00.
Mánakvøldið 7. febr. kl. 20.00: Møti við oberstlt. Inger og Einar Høyland.
Øll eru vælkomin.

**Betania Sunnba**
Møti verður sunnukvøldið kl. 20.00.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 7. februar:*
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14.00–16.00: Havnarprát, Birgar V. Johannesen
kl. 14.00–17.00: Kortspæl, telving, landastrok o.o. spøl.
**Tilmelding** til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491
*Týsdagin 8. februar:*
kl. 10.00–11.30: Sangur, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00: Gerandisdagurin hjá Jórunni og dótturini, ið hevur Down Syndrom
*Mikudagin 9. februar:*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði. Hovi er at koma sum gestir
kl. 15.00–17.00: Opið hús
*Hósdagin 10. februar:*
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00–11.45: Enskt talumál, Ásmundur V. Johannesen
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14.00–16.00: Boccia í kjallaranum
*Fríggjadagin 11. februar*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 12.00: Døgurði. Hovi er at koma sum gestur. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 15-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eldrafelagið Nón**
Vit koma saman til føstulávintshald í húsi felagsins mánakvøldið kl. 19.30.

**Dagtilhaldið Fløvi**

# EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Eg vil Harranum lova, so leingi eg livi, lovsyngja mínum Guði, meðan eg eri til.*
Dávids sálmi 146, ørindi 2.

Í ein ávísan mun eru vit ikki eldri enn vit halda okkum vera, og gera okkum til. Hava vit slept framtíðardreymunum, hava vit mist vónina, tá eru vit vorðin gomul. At liva er at vera virkin í tann mun, sum vit eru ment.

Vit eiga at royna at halda áfram at gleðast yvir lívið og tilveruna. Vit skulu hava álit á okkara medmenniskjum og samstundis vísa teimum álit. Vóna vit samtíðis á Guð, tá ger tað minni, um vit eru yngri ella eldri. Men hetta kemur ikki av sær sjálvum, roynslan lærir okkum mangt. Tí eiga vit alla tíðina at skapa okkum áhugamál, ið gera lívið vert at liva. Og tað kemur okkum til góðar í ellisárum. Tað ber til, hóast høgan lívsaldur, at vera ungur í anda.

Um sál okkara er í sambandi við lívið, tá er andi okkara eisini ungur. Lívið sjálvt er samfelagið við Guð. Munur er á tí at liva og at vera til. – Guð ynskir, at vit skulu liva. – Lívið er gleðin um at eiga góð medmenniskju og vera nakað fyri tey, og tey fyri okkum. Lívið er vón, sum ongantíð eldist ella doyr. Lívið er Guðs gáva, tí er lívið eisini ævigt. Fyri lívið og teir møguleikar, ið tað gevur okkum, skulu vit vera Guði takksom. Ja, vit skulu lovsyngja Guði meðan vit eru til.

*Oss yvirgylli tín dýrdarflóð*
*sum sólin um middagsstundir,*
*tú lýsi yvir vár leiði ró*
*við glæmu tær sólfallsstundir!*

**Heri Joensen, prestur**